# Kjak



Johan Petersen

## Kelduvað við svartaspillu

*Út er komin bók við keldutilfari, sum hevur samband við fólkaatkvøðuna í 1946. Bókin er eitt valaverk við hópin av keldum, sum siga frá og um fókaatkvøðuna. Bert spell, at høvundin ikki kann halda sær frá, at gera sínar subjektivu tulkingar ístaðin fyri at lata keldutilfarið upp til lesaran at meta um*

Bókin »Fólkaatkvøðan 14. september 1946« kom út í vikuni, sum fór. Hetta er eitt valaverk, sum Zakarias Wang hevur latið úr hondum. Á meira enn 800 síðum endurgevur hann skjøl, greinar og annað tilfar, sum á ein ella annan hátt hava samband við fólkaatkvøðuna, sum fór fram 14. sept. 1946. Bókin er snøgg, liggur væl í hondini, hóast hon er so rúgvusmikil, sum hon er.

### Samtíðarkeldur

Høvundurin er inni á tí heilt rætta, tá ið hann sigur, at fyri at kunna siga nakað haldgott um fólkaatkvøðuna, er neyðugt at sleppa fram at samtíðarkeldum. Bókin er eitt savn av øllum teimum keldum, sum høvundinum er eydnast at fáa hendur á. Hetta skal verða við til at lýsa upp í tí myrkri, sum flestu okkara vála í, tá talan er um hesa fólkaatkvøðu.

Tó sigur Zakarias, at hann ikki hevur tikið so nógv við frá løgtingstíðindum, tí hetta tilfar er alment tilgongiligt. Og tað er kanska eisini gott, tí bókin hevði kanska blivið ov óhandug, um alt tað tilfarið eisini hevði komið við. Tann sum vil vita meiri enn tað, sum er endurgivið í hesi bók, hevur atgongd á internetinum til løgtingstíðindi.

### Mistulkingar

Men loysingarfólki líkt, kann Zakarias ikki halda sær frá at gera sínar egnu subjektivu mistulkingar av úrslitinum av fólkaatkvøðuni. Tær nýtist ikki eingang at blaða upp í bókini fyri at síggja, at høvundurin ikki letur lesaran gera sær sína egnu meting av keldutilfarinum, tí bókin hevur undirtitulin »Stjórnaruppskotið 49,3 % - Loysing 50,7 %«.

Soleiðis signalerar Zakarias longu uttan á permuni, at bókin ikki er seriøs, og tað er spell, tí bókin er avgjørt eitt veruliga gott íkast til at kunna skilja fólkaatkvøðuna. Tað er sum um, at høvundin ikki hevur álit á, at lesarin er førur fyri at gera sær sína egnu meting, ella kanska tí, at keldutilfarið als ikki gevur ta uppfatan, sum loysingarmenn hava trúttað niður í føringin í meiri enn 60 ár! Og væl vitandi, at fáur man fara at lesa hesa bók úr enda í annan, ja, so tænir tað endamálinum, at forsíðan, sum øll jú síggja, skal avgera meiningina hjá lesaranum.

### Øll tald við sambært Th. Petersen

Úrslitið av fólkaatkvøðuni var og verður, óansæð hvussu nógv loysingarmenn siga nakað annað, at 47,2 % vóru fyri stjórnaruppskotinum, 48,7 % fyri loysing, 4,1 % ógildugar atkvøður og valluttøkan var 66,4 %. Ella í mun til øll, sum høvdu valrætt 31 % fyri stjórnaruppskotinum, 32 % fyri loysing, 4 % ógildug og 33 % vóru ikki á vali. Tølini hjá Zakariasi eru tulkingar av hesum tølum, har ógildugar atkvøður ikki telja við.

Men hvat stendur í bókini hjá Zakariasi um hetta? Hvat siga samtíðarmenn? Jú, Th. Petersen, tingformaður, formaður Fólkafloksins og stavnamaður fyri loysingini sigur, at »...Øll tey, sum hava verið við valborðið, verða tald við...« (síða 498). Hevur hetta ikki týdning? Er tað rætt mótvegis teimum 478, sum bert gjørdu, sum Th. Petersen bað tey gera? Neyvan.

### Svartaspilla kom í

Tey 50,7 %´ini hjá Zakariasi nevnir hann ein trivaligan sigur, men tey 53 %´ini (grundað á sama útrokningarhátt) fyri stjórnaruppskotinum í heimbygd hansara Kaldbak nevnir hann ein lítlan meiriluta! Soleiðis eru flestu viðmerkingar Zakariasar óseriøsar og tendensiøsar.

Samanumtikið er bókin hjá Zakariasi eitt valaverk, sum var betur farin uttan ta svartaspillu, sum Zakarias sjálvur er faðir at.



Jóna Mortensen

## Noyðsla førir til mistrivnað

At noyða fólk at gera nakað, tey ikki trívast við, førir til mistrivnað, og er hetta ikki gongda leiðin. Mistrivnaður á arbeiðsplássi førir til lívsónøgd. Verður tú tvungin til at gera nakað, sum tú avgjørt ikki trívist við at gera, ávirkar hetta teg og tey rundanum teg.

Hoyrdi í tíðindunum, at nú skal »strammast upp« í ALS skipanini, soleiðis at arbeiðsleys skulu í fiskivinnuna. Tað gongur illa at manna línuskipini, og tí skulu arbeiðsleys nú manna hesi skip.

Hví man tað vera so ringt at manna hesi skip? Hví eru hesi størv ikki 'attraktiv'?. Jú, tí tey eru krevjandi innihaldsliga og stravin kropsliga.

Eg haldi ikki, at ALS skal ganga á odda og fáa fólk í óynskt arbeiði, t.v.s. arbeiði sum tey slettis ikki ynskja ella kundu hugsað sær. Hóttanin um at taka stuðulin frá teimum, ella koyra tey úr skipanini, um tey ikki taka av hesum arbeiðstilboði, er í mínari verð burturvið og óvirðilig fyri tann einstaka persónin.

Heldur skuldi ALS-orkan og tíðin hjá fólki í Als skipanini verði nýtt til at funnið røttu 'arbeiðshilluna' fyri tann einstaka.



Levi Mørk

## Brennivínið út í handlarnar og avgjøld til fyribyrging!

Tíðin er ikki komin til, at tað almenna skal gera brennvínsøluna til eitt alment partafelag, nei, tíðin er komin til at leggja søluna út á privatar hendur, til handilslívið at umsita. Eitt gott dømi um broyttar drekkivanar var henda ólavsøkan.

Ólavsøkan var væl fyriskipað sum ongantíð áður. Tað var hugaligt at skoða til hesa ólavsøkuna, ongar stórar Akvavitfløskur at síggja sum fyrr í tíðini, og føroyingar og teirra drekkivanar teirra eru nógv broyttir, hetta var henda ólavsøkan eitt gott dømi um.

Á ólavsøku í ár vóru fleiri vælfyriskipaðar caféir, har tann sum vildi kundi keypa sær eina ella tvær øl um hann/hon vildi tað og hetta er eisini eitt gott dømi um, at vit føroyingar duga væl betri at drekka enn áður.

Sjálvandi eru tað nøkur, sum ikki duga og tola so væl at nýta rúsdrekka við skili. Men til hetta er at gera eitt gott fyribyrgjandi arbeiði, og tað skal landið saman við handilslívinum og fráhaldsrøslunum syrgja fyri.

Tað er burtvið, at gera eitt alment partafelag og við at útbyggja verandi rúsdrekkasølu og nei lat brennvínsøluna upp fyri handilslívinum at umsita og brúki avgjøldini til fyribyrging.

So her eri eg eisini samdur við Heðin D. Poulsen, greinskrivara, har hann skrivar um sama evni og eg loyvi mær at endurgeva nakað her: »Heldur skuldi almenna brennivínssølan verið avtikin, og síðani kundu milliónirnar sum vóru at spara í almennari umsiting verið brúktar til fyribyrging, upplýsing og til tað framúrskarandi arbeiðið ymisku fráhaldsrørslurnar og stovnarnir gera fyri tey, har brennivínið hevur tikið yvir.« (endurgeving endar). Her eri eg púra samdur við Heðini.

Ja, tað er tíð uppá at fáa endurskoðað okkara rúsdrekkalóg og lagt søluna til privatar hendur t. e. til handilslívið at umsita og ikki brúka meira pengar til almenna fyrisiting og eitt nú við gera eitt alment partafelag, sum talan nú er um frá almennari síðu.

Sum sagt ólavsøkan í ár, sum var vælfyriskipað, var eisini eitt gott dømi um at føroyingar og teirra drykkivanar eru nógv broyttir, ja, nú er bara eftir hjá øllum pørtum at fylgja við.